ikki nógv fyri reiðaríið. Heldur enn at venda sær móti skiparanum

"tillader Rederiets Repræsentant i Retten sig en saadan Tarvelighed som den at forlange Styrmand Evensens Forklaring over, hvorfra han havde faaet Penge til Hjemrejsen, og hvorfor han ikke havde taget Pengekassen med, da han var nede i Kahytten, umiddelbart forinden han gik i Baaden.

Mens Kaptajn Jensen behandles med den mest udsøgte hensynsfuldhed, sjofles og mistænkeliggøres den færøske Styrmand med et ligesaa dumt som krænkende Forhør over, hvorfra han har faaet Penge til Rejsen. Og dette tiltrods for, at vor Landsmand, hvis sjældne Dygtighed og Mod som Sømand alle er enige om at berømme, kun har oppebaaret Løn for en Maaned lige siden Selskabets Damper Kong Inge sidst Nytaarsdag forliste ved Island.

Og so loyva teir sær at "krænke en Djærv og ærlig Sømand med et Spørgsmaal som dette." Pengar til heimferðina fekk Christian m.a. frá pápanum.

## Virksemi úr Hull

Christian giftist í Hull við Amy Black f. 14.4. 1879. Tey fáa seks børn: Gladys Essery, Peter, Amy, Mona Rendall, Margrethe Cox og Frida Moore. Nær hann er fluttur til Hull vita vit ikki, men Peter, sum var næstelstur, var føddur í 1909. Tískil hevur hann helst búð í Hull, tá ið hann var við Konge Inge og Trygve.

Í Hull fær Christian sær ein stóran flota av trolarum og línubátum, skrásettir í Føroyum. Lutvíst átti hann skipini sjálvur, og lutvíst var tað sum umboð fyri reiðaríið Black & Co í Hull har Cristian var versonur.

Tey skip, sum eru skrásett í Føroyum, vóru:

"Karen of Thorshavn," bygd 1894. Hækbygget af Jern paa Klink. Skruedampskib – 2 master. Bundslæbende fiskeri. Fører: Mortan Johan Mortensen af Arge. Skrásett 15.12.1908.

Hetta hevur sum tað skilst verið ein trolari, og tað sama hevur verið galdandi fyri tey flestu um ikki øll tey fylgjandi skipini.

· "Syv Søskende af Thorshavn", skrásett 15.12. 1908.
· "Thora af Thorshavn", fører Samuel Johannes Jensen, skrásett 9.2. 1909.
· "Cicilia af Thorshavn, skrásett 9.2. 1909.
· "Nansen af Thorshavn", skrásett 23.3. 1909
· "Finsen af Thorshavn", skrásett 22.3. 1909
· "Poulina af Thorshavn", skrásett 28.3. 1909
· "Dorthea af Thorshavn", skrásett 15.7. 1909
· "Earl of Hereford af Thorshavn", skrásett 31.12 1912
· "Erling af Thorshavn", skrásett 27.8 1914
· "Fezante af Thorshavn", skrásett 31.12 1916.
· "Romilly af Thorshavn", skrásett 31.12 1916
· "Grani af Thorshavn", skrásett 23.3. 1916. Skipari Poul Jacob Højgaard, Toftir
· "Eirikur af Thorshavn", skrásett 3.2. 1917. Skipari Mortan Johan Mortensen
· "Mars af Thorshavn", skrásett 12.12.1917

Her er talan um minst 15 skip, og øll hava tey Thorshavn í navninum. So Christian hevur verið við til at gera Havnina kenda um høvini.

Hetta vóru so skip, sum komu at gera mun í Føroyum, tí tey vóru eisini mannað av føroyingum. Tingakrossur skrivar í 1911, at tað kanska fór at standa á at manna allar sluppirnar hetta árið, tí so nógvir føroyingar fóru við enskum og skotskum trolarum. Bara á Eiði fóru 23 mans sum flekjarar við einum stórum móðurskipi, sum trolarar skuldu veiða til. 24 mans vóru tá knýttir at trolarafelagnum hjá Christian Evensen. Hetta merkti, at einar fýra manningar vóru færri til sluppirnar.

## Loysti seg betri at veiða sild enn tosk

25. juli 1911 fór Christian Evensen av Havnini við tveimum trolarum á sildaveiðu undir Íslandi. Prísurin á toski var so lágur, at tað loysti seg ikki at fiska hann, men útlit vóru til, at sildaprísurin fór at vera góður. Hann hevði annars verið lágur, tí so nógv sild var veidd.

Tilsamans vóru 36 manns við báðum trolarunum – 12 føroyingar, 12 norðmenn og 12 úr øðrum londum.

Fyri at kunna flyta sildina til útlandið, tá ið lagaligast bar til, hevði Christian Evensen eisini eitt farmaskip við sær, sum skuldi flyta sildina til Svøríkis, har hann ætlaði at selja hana.

Hann hevði eisini roynt sildaveiðu undir Íslandi árið fyri. Tá bar ikki til, og hann misti kr. 20.000. Men sum hann sjálvur segði, at "skal mann fáast við sildaveiðu í stórum líki, so nyttar einki at gevast fyri at man einaferð setur pening til."

Hann hevði tvær støðir á Eyafirði, har Akureyri liggur inni í botninum. Her varð sildin landað og hagreidd til útflutnings.

22. august var norski damparin Valhall á Havnini. Hann hevði 3.700 tunnur av sild, sum hann fór til Keypmannahavnar við. Bert tann eina dagin høvdu skipini hjá Christian Evensen fingið 1.500 tunnur. Valhall var aftur á Havnini síðst í september á veg til Keypmannahavnar við 3.600 tunnum av sild.

Eitt av skipunum hjá Chr. Evensen, Nansen, fórst undir Íslandi í mars mánaði. Átta føroyingar vóru við. Øll manningin varð bjargað.

Ein trolari hjá Chr. Evensen bjargaði einum enskum trolara undir Íslandi í august sama ár. Trolarin var komin ov nær landi, og manningin var rýmd av honum.

Trolarin hjá Chr. Evensen kom til hjálpar, tók manningina upp og sleipaði trolaran inn á Eyafjørð. Ein føroyingur var við enska trolaranum.

## Føroyingar við Chr. Evensen

Minst níggju av skipunum hjá Jens Evensen vóru trolarar, og hann hevði nógvar føroyingar við. Hesir fingu rættindi sum teir annars ikki fingu.

Óla Jákup Christiansen á Stykkinum var í trý ár við tveimum av skipunum hjá Christian, fyrst við Passing um várið og summarið 1913, og síðan um heystið og árið eftir við Romilly, sum Gøtu Anton (Jacobsen) førdi.

Um várið 1915 fóru hesir bátar at sigla undir eingilskum flaggi og sluppu tí ikki at fiska í Murrayfirth innan fyri 10 fjórðingar, sum var galdandi fyri eingilskar trolarar, men ikki fyri trolarar, ið sigldu undir útlendskum flaggi. Hesir trolarar fóru tí aftur til Íslands at royna.

Mortan Mortensen á Argjum førdi Karen, fyrsta skipið hjá Christian Evensen. Í 1917 førdi hann trolararan hjá honum Eirik, og hann var stýrimaður við honum árini 1918-1922 við Gøtu Anthon sum skipara. Stýrimaður hjá Mortani var Johan Hendrik Rubeksen í Havn. Mortan var ein av okkara fremstu trolaramonnum. Hann gekk burtur við Nýggjaberg í 1941.

Tað sæst í Dimmalætting so seint sum í 1916, at Christian Evensen var komin til Havnar við báðum sildadamparum sínum Grana og Eiriki undan Íslandi, har veiðutíðin nú var av fyri árið.

Tilsamans høvdu teir hetta summar fingið millum 9.000 og 10.000 tunnur av sild, sum vóru seldar til Onglands. Tað var Christian Evensen nøgdur við.



*Alethea og Christian Peter Evensen í 1947. Hann var uppkallaður eftir pápanum*

Kjartan Mohr skrivaði einaferð, at mammubeiggin stutt áðrenn hann doyði hevði keypt sær eitt stórt øki inni í Runavík, sum var ætlað til eitt stórt føroyskt trolarafelag.

Tað hevur verið eitt sindur av sambandi millum ættirnir. Peter Even, sonur Jens Mohr, fór sum ungur til Hull at læra handilsskap hjá Christian. Men hugurin var meira til sjógvin, og skjótt fór hann út at sigla.

Christian Evensen gjørdist ikki gamal maður, 48 ára gamal. Tað verður hildið, at hann var deyður í 1920-unum.

## Peter Evensen var krígshetja

Peter, sonur Christian, var onkuntíð og vitjaði ættina í Føroyum. Hann er tann einasti av teimum, sum vit vita nakað um. Hetta er frá minningarorðum í Daily Telegraph, tá ið hann doyði í 1995, 86 ára gamal.

Peter var heryvirmaður undir seinna heimsbardaga. Hann fekk tað ummæli, at hann var ein djarvur skipari við góðum úrslitum í Miðalhavinum.

Tann 19.januar 1943 var hann skipari á einum torpedobáti í Opereation Childhood á einum álopi í Tripoli í Libya í Norðurafrika, sum tá var hersett av týskarum.

Men hetta endaði við, at 23. januar kundi Montgomery taka Tripoli, og var hetta eitt bakkast fyri týska herin. Evensen fekk tá heiðursmerki.

Flotadeildin hjá Evensen arbeiddi fram við strondini í Sisilia og í Mesinna strætinum í september 1943 sum ein bjargingareind. Teir fingu bjargað 22 niðurskotnar flogskiparar. Nakrir av teimum vóru týskarar.

Christian Peter Evensen var føddur 21. mai 1909 og fekk útbúgving við Scarborough háskúlan áðrenn hann fór í flotan, har hann mest sigldi við troppaskipum til fjareystur.

Hann var sera hógligur maður. Hóast hann var kallaður "fearless" (óttaleysur) var hann ein skilamaður út í odd og egg, sum ikki tók sær óráð fyri.

Tá hann at enda kom skaddur heim aftur frá sínum virksemi í Miðalhavinum, hevði hann yvirlivað nógv vandafull tiltøk, og hann varð virdur av øllum, sum vóru saman við honum.

Peter fór úr flotanum í 1947. Eftir at hava fingið eina landbúnaðarútbúgving var hann skrivari hjá bóndafelagnum á staðnum.

Evensen átti ein son í fyrra hjúnarlagnum. Við seinnu konuni Aletha Archer fekk hann ein son og tríggjar døtur.

**Í komandi parti**
verður greitt frá próstinum Jens Christian Evensen, pápabeiggja Christian Evensen